## Fiska nú rognkelsi

Í 55 dagar um várið hava íslendsk skip loyvi at fiska rognkelsi. Vertíðin í ár er júst byrjað norðanfyri, og seinni sleppa skip eisini at royna vestanfyri. Morgunblaðið skrivar, at eydnast tað at fáa 8.000 tons av saltaðum rognum burtur úr vertíðini, kemur avreiðingarvirðið upp á 700 milliónir íslendskar krónur. Sambært blaðnum eru umleið 600 mans við skipunum, sum royna eftir rognkelsi. Teir, sum hava fingið loyvi til at royna eftir rognkelsi, hava bundið seg til at gevast við fiskiskapinum, um óvanliga nógv er at fáa, tí annars fellur prísurin og nógv.



# Ætla at loyva skipum at avreiða meiri uttanlands

**Landsstýrið umhugsar nú at lata fiskiskipum eitt fyribils loyvi til at avreiða meiri uttanlands, sigur Kaj Leo Johannesen, løgmaður**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú sleppa føroysk fiskiskip kanska at avreiða meiri fisk uttanlands.

Tað staðfestir Kaj Leo Johannesen, løgmaður.

Hann sigur, at fyri at bøta um okkara kappingarførið og inntøkumøguleikar, er tað neyðugt, at okkara fiskivinna hevur so rúmligar karmar sum gjørligt at virka undir.

Í hesum sambandi arbeiðir landsstýrið við at broyta reglarnar fyri avreiðingum uttanlands.

- Í hesum sambandi er ætlanin at skip skulu fáa eitt fyribils loyvi til at avreiða meiri uttanlands, sigur Kaj Leo Johannesen.



*Nú ætlar landsstýrið at loysa eitt tjóður, sum hevur bundið fiskiskipini føst í eini skipan sum forðar teimum í at fáa tann besta prísin*

Men hann sigur, at hetta verður ikki ein varandi loysn, men ætlanin er, at hetta skal vera galdandi í eina tíð, til viðurskiftini aftur eru fingin í rættlag.

### Manglar keypiorka

Løgmaður sigur, at tað sær út til, at fleiri ferðir, tá ið skip avreiða í Føroyum, er ikki nøktandi keypiorka til hann og tí er fiskur komin at standa óseldur á fiskamarknaðinum.

- Tað er spurningurin um tað ikki er tekin um ein gjaldføristrupulleika hjá føroyskum fiskakeyparum – saman við einum marknaðartrupulleika.

- Tað er ein spurningur um vit ikki vera noydd at seta eina slíka fyribils skipan í verk, leggur hann afturat.

Eitt er at geva skipunum fríari ræsir at avreiða uttanlands. Men fer tað ikki bara at føra til, at meiri fiskur fær óvirkaður av landinum, so at arbeiðsloysið á føroysku virkjunum økist?

Nei, tað haldi eg ikki, sigur løgmaður. Hann sigur, at tað vísir seg sum um, at føroysku virkini fáa rættiliga nógvan fáa fisk og kanska hava so nógv tey klára at svølgja, serliga nú ein stórur keypari, sum Kósin, er farin av marknaðinum.

Samstundis sigur hann, at virkini framvegis kæra seg um, at tey hava trot á arbeiðsmegi.

Tí kann tað vera, at fløskuhálsar taka seg upp á virkjunum, serliga í ávísum tíðarskeiðum.

- Hetta er ein spurningur um at fáa fiskin undan, fyri ein nøktandi prís, sum skipini fiska, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann sigur, at tað ber ikki til at hava ein fløskuháls í vinnuni, sum uppstendur av, at virkini ikki fáa keypt fiskin, so at hann heldur stendur óseldur.

Tí arbeiðir landsstýrið nú við eini ætlan um at geva føroyskum skipum fríari ræsur at avreiða uttanlands í eini skiftistíð, fyri ikki at missa virðisøkingina á gólvið, sigur løgmaður.

# Søtur musikkur í oyrunum á reiðarum

**Tað er gleðiligt, at landsstýrið nú vil loyva skipum at avreiða meiri uttanlands, sigur Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta var gleðiligt at frætta.

Tað er søtur musikkur í oyrunum á Vibergi Sørensen, formanni í Reiðarafelagnum, at landsstýrið nú ætlar at geva skipunum fríari ræsur at landa uttanlands, soleiðis sum løgmaður greiðir frá í greinini omanfyri.

Hetta er tað, vit hava sóknast eftir leingi, sigur hann.

Sum støðan er nú, kunnu skipini í mesta lagi avreiða 25% av fiskinum uttanlands í hvørjum ársfjórðingi.

- Tað hevur verið okkum ein stór forðing, serliga nú oljan er vorðin so dýr, staðfestir Viberg Sørensen

Hann sigur, at skip eiga at fáa møguleikan at fara til Skotlands, ella aðrastaðni, at avreiða og at bunkra olju, vissi samlaða roknistykki vísir, at tað er ein fyrimunur, heldur enn at verða tvingað at avreiða í Føroyum.

### Allar forðingar burtur

Hann sigur, at í seinastuni hevur tann trupulleiki eisini tikið seg upp at fiskavirkini eru kjokkfull av fiski og hava ikki orku at keypa meiri og tí kemur fiskur at standa óseldur á fiskamarknaðinum.

- Men kortini verða føroysk skip tvingað til Føroyar at avreiða, hóast tey vita, at ongin keypari er, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum.

Hann sigur, at Reiðarafelagið vil eisini hava ásetingina burtur, sum tvingar føroysk skip at avreiða umvegis uppboðssølu.

- Hóast vit vita, at ongin keypari er, verður fiskurin tvingaður um uppboðssøluna og tí vilja vit hava hesa ásetingina burtur, so at skipini eisini kunna selja fiskin sjálvi.

### Ongan møguleika

Viberg Sørensen sigur, at skulu vit hava fría kapping, so lat okkum hava fría kapping og tí alla allar forðingar at verða tiknar av.

- Sostatt er hann fegin um nýggja stigið hjá landsstýrinum

Hann sigur, at í grundini er spurningurin rættiliga einfaldur: Er prísurin betri í Føroyum, fer onki uttanlands av avreiða, tí so loysir tað seg ikki.

Men hann heldur, at í pørtum av flotanum er støðan so vánalig, at skipini eru rætt og slætt noydd at fáa sum mest burtur úr hvørjari last.

Ein bólkur, sum hevur tað serliga tungt, er línuflotin.

-Við tí fiski og prísi, sum er nú, hava tey ongan møguleika at svara hvørjum sítt, staðfestir reiðaraformaðurin.

- Tí eiga allar forðingar at verða tiknar av, leggur hann afturat.

Men nú sigur løgmaður, at ætlanin er bara, at hetta skal vera í eini skiftistíð?

- Tað er so, hvat tað er. Lat okkum so síggja, hvussu tað hilnast og so kunnu vit taka tað haðani frá, sigur Viberg Sørensen.